# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og sirm ella mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og regn ella mjørki í støðum. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og fyrrapartin yvirhøvur turt, men mjørkaflókar. Seinnapartin regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, men leygardagin gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin milum 8 og 12 stig.

# Nýtt Vinnuhús á Óðinshædd





*Soleiðis fer nýggja Vinnuhúsið á Óðinshædd í Havn at síggja út sambært skitsuuppskotinum hjá Fuglø Arkitektum*

**Feløgini í Vinnuhúsinum fáa nú rúmshættari og glæsiligari umstøður, tí tey hava gjørt av at byggja nýtt hús sum karm um virksemið hjá vinnufeløgunum**

VINNUFELØG
*Tíðindaskriv*

Húsini verða bygd á Óðinshædd í Havn, og er tað Fuglø Arkitektar, ið hava gjørt skitsuuppskotið.

Tað verða Føroya Arbeiðsgevarafelag, Havnar Arbeiðsgevarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag sum koma at eiga nýggja Vinnuhúsið. Føroya Arbeiðsgevarafelag kemur, eins og í dag, at standa fyri rakstrinum, meðan hini feløgini í skrivstovufelagsskapinum koma at keypa tænastur frá Arbeiðsgevarafelagnum.

Í sambandi við bygging av nýggjum Vinnuhúsi bóðu feløgini um skitsuuppskot frá trimum arkitektavirkjum. Bygginevndin hevur nú viðgjørt innkomnað tilfarið og hevur avgjørt at velja uppskotið hjá Fuglø Arkitektum sum grundalag undir framhaldandi projektering.

Uppskotið hjá Fuglø Arkitektum til nýtt Vinnuhús.

Í bygginevndini fyri nýggja Vinnuhúsinum sita Vilhelm M. Johannesen, Tummas Sørensen, Leivur Michelsen, Jan Mortensen og Bjørgbríð Ludvig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | 19 |
| Halifax | 28 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 30 |
| Róm | -- |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1007 hPa. í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og grynnist spakuliga. Eitt annað lágtrýst, 998 hPa. eystan fyri New Foundland fer eystureftir og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06[00]– 07/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06[00]–07/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 6,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

25. juni: Mánin longst frá jørðini
29. juni: Tendring
4. juli: Jørðin longst frá sólini
7. juli: Fyrra kvarter
10. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. juli | 02.06 | 14.42 | 01.06 | 13.42 | 01.21 | 13.57 | 04.06 | 16.42 | 05.06 | 17.42 | 00.21 | 12.57 | 11.57 | — | 02.21 | 14.57 | 03.21 | 15.57 | 01.51 | 14.27 | 03.06 | 15.42 |
| 9. juli | 03.18 | 15.41 | 02.18 | 14.41 | 02.33 | 14.56 | 05.18 | 17.41 | 06.18 | 18.41 | 01.33 | 13.56 | 00.33 | 12.56 | 03.33 | 15.56 | 04.33 | 16.56 | 03.03 | 15.26 | 04.18 | 16.41 |
| 10. juli | 04.05 | 16.30 | 03.05 | 15.30 | 03.20 | 15.45 | 06.05 | 18.30 | 07.05 | 19.30 | 02.20 | 14.45 | 01.20 | 13.45 | 04.20 | 16.45 | 05.20 | 17.45 | 03.50 | 16.15 | 05.05 | 17.30 |
| 11. juli | 04.56 | 17.26 | 03.56 | 16.26 | 04.11 | 16.41 | 06.56 | 19.26 | 07.56 | 20.26 | 03.11 | 15.41 | 02.11 | 14.41 | 05.11 | 17.41 | 06.11 | 18.41 | 04.41 | 17.11 | 05.56 | 18.26 |
| 12. juli | 05.56 | 18.30 | 04.56 | 17.30 | 05.11 | 17.45 | 07.56 | 20.30 | 08.56 | 21.30 | 04.11 | 16.45 | 03.11 | 15.45 | 06.11 | 18.45 | 07.11 | 19.45 | 05.41 | 18.15 | 06.56 | 19.30 |


veitst tú ikki tað?
Sosialurin

www.sosialurin.fo

HESTPRENT Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo


5 707265 100029 >